

# Reykjavík

## Shopping

Vit fáa nógv fyri pengarnar, og úrvalið er óavmarkað í Reykjavík. Íslendska krónan er nú so lág, at vit føroyingar hava stóran fyrimun av at keypa í Íslandi, sum annars hevur verið tiltikið dýrt. Í dag fæst nógv meira fyri pengarnar, tí virðið á lokala gjaldoyranum er lækkað við næstan einum triðingi. Her er eisini vert at hava í huga jólagávurnar, nú tað styttist til jóla.

## Gott fyri eygað

Paris, London, Milano, Tokyo, New York og Reykjavík. Far norður í hav, um tú vilt uppliva tað allarnýggjasta innan móta og design. Íslendingar eiga fleiri dugnaligar sniðgevarar, bæði tá ið tað snýr seg um brúkslist, prýðislutir og klæði.

Kreativu grannarnir eru víðagitnir fyri at framleiða dygdargóðar vørur við energiskum hugflogi, stuttligum og nýskapandi linjum og úr natúrligum tilfari. Designhandlarnir eru sum sannar listaframsýningar á at líta, og flest allir eru at finna mitt í býnum, á høvuðsgøtuni, Laugarvegur, og niðan eftir síðugøtuni, Skólavörðustígur. Tað loysir seg at leita eftir hesum smáu handilsperlunum, sum ofta eru væl fjaldar inni í bakgarðum og á ovaru hæddunum.

## Design

**Asta - creative clothes**
Laugavegur 25
www.astaclothes.is

**GuSt**
Laugavegur 70
www.gust.is

**Steinunn**
Laugavegur 40
www.steinunn.is

**Kraum**
Aðalstræti 10
www.kraum.is

**66°North**
Bankastræti 5 og í Kringluni







